KLAKSVÍKAR KOMMUNA
Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Undirskrift formansins:_____

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 25.03.2021 kl. 17:30

Málsyvirlit		
33/21	21/00360-1	Integratión – nýskipan av integratiónsnevndini og umsitingini á økinum
34/21	21/00432-1	Stovnan av stýrisbólki fyri útstykkingina á Fossum
35/21	20/01182-11	Broyting av byggisamtykt fyri Trøllanes, matr.nr. 11a
36/21	20/00355-2	Asfaltering av økinum rundan um Spinnaríið
37/21	21/00183-4	Umbýti av innangarðsjørð á Norðoyri - matr.nr. 26d og 25a
38/21	20/00628-7	Reglugerð fyri ítróttarøkið
39/21	21/00349-8	Minnisvarðin á Syðradali
40/21*	20/00233-11	Víðkan av bryggjukanti niðanfyri Pomek
41/21	21/00361-1	Møguligur forskúli – lýsing av møguleikum, fyrimunum og vansum
42/21*	19/00492-14	Stigabilur til Klaksvíkar Sløkkilið – *eyakjáttan, fyrra viðgerð*
43/21	20/01227-17	Vetrarhaldið í jan/feb 2021 - serlig avbjóðing - *eyakjáttan, fyrra viðgerð*
44/21	21/00343-14	Frostbinding, eyka útreiðslur hjá Vatndeildini - *eyakjáttan, fyrra viðgerð*
45/21	21/00407-1	Umfígging og lántøka – mars 2021
46/21	14/00763-51	Liðugtgerð av vælveruøki í Klaksvíkar Svimjihøll – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*
47/21	18/00229-56	Jústabrekka 1 leigast út til AV, meirkostnaður umvæling – *eykajáttan, seinna viðgerð*

**** Mál 40/21 og 42/21 vórðu flutt til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum***

33/21
21/00360-1 Integratión – nýskipan av integratiónsnevndini og umsitingini á økinum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	16.03.2021	12/21
2 Fíggjarnevndin	23.03.2021	47/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	33/21

21/00360-1 Integratión – nýskipan av integratiónsnevndini og umsitingini á økinum

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini 8. mars verður greitt nærri frá málinum.

Í stuttum snýr málið seg um, at mett verður, at tørvur er at endurskoða og nýskipa arbeiðið hjá Integratiónsnevndini og umsitingina á økinum.
Integratiónsnevndin varð sett á stovn 17. september 2015 við tí endamáli at umboða rødd etniska felagsskapsins og at fremja tolsemi og samsinni í Klaksvíkar kommunu sum ráðgevandi nevnd býráðsins. Í verandi skipan hevur nevndin í minsta lagi 7 og í mesta lagi 9 limir.

Viðv. samanseting av Integratiónsnevndini
Mælt verður til, at Integratiónsnevndin verður umskipað og fær hesa samanseting av limum:
- 2 býráðslimir, sum verða útnevndir av býráðnum eftir lutfalsvalháttinum. Tvs. við verandi lutfalli ein frá meirilutanum, sum verður formaður/forkvinna í nevndini, og ein frá minnilutanum
- 5-7 limir, ið somuleiðis verða útnevndir av býráðnum eftir innstilling frá umsitingini. Hesir nevndarlimir skulu vera ein blanding av tilflytarum og føroyingum, búsitandi í kommununi, ið onkursvegna hava ein áhuga í integratión. Tó skal tað altíð vera ein meiriluti av tilfytarum, ímillum hesar 5-7 limirnar.

Viðv. starvshátti – Integratiónsnevndin
Eisini verður mælt til, at leikluturin hjá Integratiónsnevndini ikki bert verður ráðgevandi nevnd býráðsins, men at nevndarlimirnir eisini átaka sær leiklutin sum "ambassadørar" fyri tað arbeiðið, sum Klaksvíkar kommuna ger innan integratión.

Sum dømir um starvshættir kann nevnast:
- at nevndarlimir verða kontakpersónar hjá nýkomnum tilflytarum, har uppgávan er at virka sum umboð ella 'ambassadørur' fyri býin innan integratión
- at nevndalimir eisini verða partur av planlegging, fyrireiking og rekruttering og verður við til at fremja International Day og líknandi átøk.
- at nevndarlimir verða tøkir at heita á hjá fólki, ið hava tørv á at vita meira um integratión, eins og teir fáa og taka ábyrgd av at taka avgerðir í sambandi við integratiónstiltøk og annað, ið er tengt at integratión.

Lógargrundarlag:
Integratiónsnevndin hevur heimild í kommunustýrislógini § 36, stk.1, har tað er ásett, at "Kommunustýrið kann seta serstakar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella at ráðgeva kommunustýrinum, fíggjar-nevndini ella aðrari fastari nevnd.

Fíggjarligar avleiðingar:
Higartil hevur virksemið innan integratiónsøkið verið fíggjað av játtan borgarstjórans. Talan er íalt um ein árligan rakstrarkostnað á uml. 100.000 kr., íroknað løn til samskipara, samsýning til integratiónsnevndina og fígging av átøkum, so sum International Day.

Um hetta tilmæli um nýskipan av integratiónsnevndini og umsitingini á økinum fær politiska undirtøku, verður mælt til, at áðurnevnda, neyðuga játtan í inniverandi fíggjarætlan býráðsins fyri 2021 verður flutt millum kontur, frá verandi rakstrarstaði borgarstjórans og til trivnaðarøkið, har rakstrarstaðið integratión fær egna játtan.

Eitt tilmæli um hetta – við nærri útgreiningum – verður at leggja fyri komandi fundarumfør í apríl og mai.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt til, at Integratiónsnevndin og umsitingin á økinum verður nýskipað eftir tí í hesum tilmæli lagda leisti, og at býráðið á býráðsfundinum velur nevndarlimirnar í nýskipaðu Integratiónsnevndini.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 16. mars 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 08.03.2021.

Fíggjarnevndin 23. mars 2021:
Nevndin tekur undir við E&B 16-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt.
Harumframt vórðu hesi vald í Integratiónsnevndina tað, ið eftir er av býráðssetuni: Karl Johansen og Jógvan Skorheim. Hini umboðini verða vald/útnevnd á næsta býráðsfundi.

34/21
21/00432-1 Stovnan av stýrisbólki fyri útstykkingina á Fossum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	34/21

21/00432-1 Stovnan av stýrisbólki fyri útstykkingina á Fossum

Frágreiðing um málið:
Í samband við útstykkingina á Fossum metir tekniska fyrisiting, at stýrisbólkur eigur at verða settur á stovn.

Byggireglur kommununnar siga, at ein fimmmanna nevnd skal veljast at hava fulla ábyrgd fyri verkætlanum omanfyri 10 mió. kr., tá ið hesar verkætlanir verða framdar, men kommunan hevur ongantíð brúkt tær reglurnar.

Ístaðin er ein byggiharraráðgevi settur, ið samstarvar við ein stýrisbólk, sum hevur evstu ábyrgd. Kommunan hevur í hesum sambandi biðið viðkomandi nevndir og býráð gjørt frávik frá byggireglunum, tí talan er um eina strangari skipan.

Høvuðsuppgávan hjá stýrisbólkinum er at tryggja, at kommunan fær arbeiðið til rættan kostnað, til røttu tíð og við umbidnari dygd. Skipað verður fyri fundi einaferð um mánaðin, fyrsti fundardagur verður væntandi í apríl.

Sambært praksis hjá kommununi manna hesi stýrisbólkin:

1. Borgarstjórin (er formaður) – Karl H. Johansen
2. Kommunustjórin – Tummas T. Eliasen
3. Formaður/kvinna fyri nevndina, sum eigur verkætlanina (UBN) – Gunvá við Keldu
4. Stjórin fyri fyrisitingina, sum eigur verkætlanina (TF) – Óla Jákup Bech
5. Tekniski stjórin – Óla Jákup Bech
6. Stjórin fyri stovn, sum byggir - eingin í hesum føri
7. Byggiharraráðgevi (fundarskrivari) - Harley Joensen, SNA

Um mett verður, at aðrir persónar skulu luttaka á fundi ella á einstøkum fundi, so kallar formaðurin fyri stýrisbólkin hesar inn.

Lógargrundarlag:
Byggireglur Klaksvíkar kommunu

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá teknisku fyrisiting, dagf. 23-03-2021, einmælt samtykt.

35/21
20/01182-11 Broyting av byggisamtykt fyri Trøllanes, matr.nr. 11a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	15.03.2021	35/21
2 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	35/21

20/01182-11 Broyting av byggisamtykt fyri Trøllanes, matr.nr. 11a

Frágreiðing um málið:
Víst verður til býráðssamtykt dagf. 17. desember 2020 um at broyta byggisamtyktina A28 í mun til seyðahúsið tilhoyrandi festið hjá Bárði Østerø á Trøllanesi.
Ynski hjá festaranum er at fáa sundurbýtt seyðahúsi frá festinum. Hetta kann einans gerast, um seyðahúsið liggur uttanfyri byggisamtyktarøkið. Í dag liggur seyðahúsið bæði í A28 og í landbúnaðarøki.

Tann 11. januar 2021 var festarin á fundi við umboð fyri teknisku fyrisiting, har hann kom við viðmerkingum um, hvussu økismarkið heldur kundi skipast. Hetta komst av, at innsenda umsókn ikki lýsti nóg væl, hvussu økismarkið skuldi liggja í mun til seyðahús, skúr, ið brennievni verið goymt í, og økið rundan um. Harnæst varð semja gjørd um at leggja fram nýtt uppskot fyri A28.

Frá vinstru: Galdandi byggisamtykt / Broytingaruppskot frá des. 2020 / Broytingaruppskot feb. 2021

Víst verður til býráðssamtykt dagf. 17. desember 2020 og tilmæli frá Trøllanesnevndini dagf. 3. februar 2021.
Leggjast skal aftrat, at eftir fundin í Trøllanesnevndini var ivamál um gegnið hjá einum av nevndarlimunum. Tí verður málið latið Umhvørvis- og býarskipanarnevndini til støðutakan.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m.
Løgtingslóg um landsjørð v.m
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.
Fyrisitingarlógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Regulering av byggisamtyktarmarkinum fyri A28 verður latin nevnd og býráð til umrøðu og støðutakan.
Støða skal takast til, um haldast skal fast við uppskotið frá des. 2020 ella við uppskotið frá feb. 2021, ella um ongin broyting skal vera.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. mars 2021:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Nevndin heldur fast við býráðsviðtøkuna frá 17. des. 2020.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá UBN 15-03-2021 einmælt samtykt.

36/21
20/00355-2 Asfaltering av økinum rundan um Spinnaríið

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	16.03.2021	31/21
2 Tekniska Nevnd	17.03.2021	19/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	36/21

20/00355-2 Asfaltering av økinum rundan um Spinnaríið

Frágreiðing um málið:
Spinnaríið er sjálvsognarstovnur, sum eigur matr.nr. 881. Grundøkið er 1850 fermetrar til støddar, og økið, sum skal asfalterast, er mett til uml. 1000 fermetrar.

Mett verður, at asfaltsarbeiði kemur at kosta um 360.000 kr. uttan mvg.
Talan er um tilboðskostnað, sum asfalstfyritøka hevur givið kommununi. Fyritøkan upplýsir, at asfaltskostnaðurin er hækkaður 6%, men hækkingin verður ikki galdandi fyri hetta arbeiðið. Kloakk- og uppmerkingararbeiðið verður framt av Vegadeildini.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ætlanin er, at arbeiðið skal fíggjast av konto hjá mentanarøkinum, *Ítróttarøkið Íløgur*, har tilsamans 35 mió. kr. eru avsettar.
Ein partur av játtanini er til ætlaða spælilandið, sum er útsett, og er tað av hesi upphæddini, at peningurin skal takast.

Tilmæli:
Vísandi til vandan av leysum skervi og sandi, sum fýkur runt í økinum, tá vindur er, so kann fyrisitingin viðmæla, at arbeiðið verður framt.
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir til støðutakan.

Mentanarnevndin 16. mars 2021:
Ein meiriluti, JC, GVK, ASB og AJ taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, SVJ, tekur undir við tilmælinum, men mælir til at fíggingin verður funnin á tekniska økinum.

Tekniska Nevnd 17. mars 2021:
Ein meiriluti, OáL, EÓP, ASJ og AJ, tekur undir við meirilutanum í MeN 16-03-2021, og at sjálvsognarstovnurin Spinnaríið rindar ein triðing (120 tkr.) av kostnaðinum.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælini í MeN 16-03-2021 og TN 17-03-2021; tey fullu við 3 atkvøðum fyri (SVJ, TJL og JS) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JC, EP og AB); AJ atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælini í MeN 16-03-2021 og TN 17-03-2021; tey vórðu einmælt samtykt.

37/21
21/00183-4 Umbýti av innangarðsjørð á Norðoyri - matr.nr. 26d og 25a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Norðoyrarnevndin	12.03.2021	3/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	15.03.2021	39/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	37/21

21/00183-4 Umbýti av innangarðsjørð á Norðoyri - matr.nr. 26d og 25a

Frágreiðing um málið:
Í telduposti 28-01-2021 biður Umhvørvisstovan um býráðsins ummæli til umbýti av búnaðarjørð á Norðoyi – matr.nr. 25a og 26d.

Sambært øðrum festaranum er grundgevingin fyri umbýtinum m.a. høgligari atkoma til avvarðandi uttangarðsjørð í bygdini. Uttangarðsjørðin til matr.nr. 26d er matr.nr. 46d (Bøseyður).

Byggisamtyktarligu ásetingarnar verða ikki ávirkaðar av umbýtinum.

Lógargrundarlag:
Matriklullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting hevur onki í móti, at umbýti verður framt sambært umsókn.

Norðoyrarnevndin 12. mars 2021:
Nevndin tekur undir við málinum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. mars 2021:
Nevndin tekur undir við Norðoyrarnevndini 12-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá UBN 15-03-2021 einmælt samtykt.

38/21
20/00628-7 Reglugerð fyri ítróttarøkið

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	16.03.2021	29/21
2 Fíggjarnevndin	23.03.2021	39/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	38/21

20/00628-7 Reglugerð fyri ítróttarøkið

Frágreiðing um málið:
Eftir samskifti við leiðsluna í kommununi hevur leiðarin fyri Klaksvíkar Ítróttardepil í samráð við feløgini, sum brúka ítróttardepilin, gjørt hjáløgdu reglugerð fyri nýtslu av hølum í Klaksvíkar Ítróttardepli.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin og býráð taka undir við uppskotinum, sum leiðarin fyri Klaksvíkar Ítróttardepil hevur evnað til saman við feløgunum, ið virka í økinum.

Mentanarnevndin 16. mars 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-03-2021.

Fíggjarnevndin 23. mars 2021:
Tummas J. Lervig luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við MeN 16-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tummas J. Lervig og Eyðstein Ó. Poulsen luttóku ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt.

39/21
21/00349-8 Minnisvarðin á Syðradali

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	15.03.2021	45/21
2 Mentanarnevndin	16.03.2021	25/21
3 Fíggjarnevndin	23.03.2021	42/21
4 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	39/21

21/00349-8 Minnisvarðin á Syðradali

Frágreiðing um málið:
Nærri verður greitt frá málinum í skrivi frá umsitingin 4. mars 2021.

Málið snýr seg í stuttum um, at ynski er um, at kommunan yvirtekur matr.nr. 7b, har minnisvarðin er staðsettur, at minnisvarðanevndin á Syðradali heldur fram og er virkin kirng hald og at seta nøvn á minnissteinar, og at býarfríðkanardeild kommununnar yvirtekur yvirskipaðu røktina og skipanina av økinum.

Lógargrundarlag:
Eingin beinleiðis lógarheimild er fyri hesum átaki, men minnisvarðar av slíkum slagi hava almennan áhuga, og kommunan eigur og rekur t.d. minnisvarðan í gamla Kirkjugarði. Grundleggjandi er hetta sostatt eitt almannagagnligt tiltak, sum hevur til endamáls at minnast og vísa virðing fyri teimum, sum eru farin á sjógvi og landi. Tiltakið lýkur sostatt ta grundleggjandi regluna um almannagagn, og kommunan hevur tí grundleggjandi heimild til at reka og luttaka í hesum tiltaki, ið annars hoyrir kommununi til.

Fíggjarligar avleiðingar:
Á framtíðar fíggjarætlanum kann verða sett kr. 30.000,- av til røkt og at seta nøvn á steinar – eins og at fríska nøvn uppaftur.

Tilmæli:
Mælt verður til:
- UBN: At lendið matr. nr. 7^b, sum Erik Eliasen eigur, verður skjeytað kommununi
- MeN: At lokala minnisvarðanevndini heldur fram og viðløgda reglugerð verður galdandi fyri framhaldandi virkseminum hjá lokalu minnisvarðanevndini.
- MeN: at býráðið yvirtekur røktina av minnisvarðanum og økinum kring minnisvarðan.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. mars 2021:
Nevndin tekur undir við, at lendið, matr.nr. 7b, verður skeytað kommununi.

Mentanarnevndin 16. mars 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-03-2021.

Fíggjarnevndin 23. mars 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 16-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt.

41/21
21/00361-1 Møguligur forskúli – lýsing av møguleikum, fyrimunum og vansum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	16.03.2021	20/21
2 Fíggjarnevndin	23.03.2021	46/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	41/21

21/00361-1 Møguligur forskúli – lýsing av møguleikum, fyrimunum og vansum

Frágreiðing um málið:
Í hesum døgum tykist tørvurin á nýggjum dagstovnaplássum at økjast alsamt skjótari, og kommunan hevur stóran skund við at byggja nýggjan dagstovn og at fyrireika framtíðar dagstovnabyggingar á hóskandi staðsetingum. Samstundis er 1. byggistig á Skúlatrød júst framt, og fyrireikingarnar av 2. og 3. byggistigi eru júst byrjaðar, har framtíðar hølistørvur skúlans skal lýsast og takast við í víðari skúlabyggingina.

Ein grundleggjandi støðutakan, sum ávirkar planleggingina á bæði dagstovnaøkinum og skúlaøkinum, er spurningurin um forskúla ella ikki forskúla. Tí er verandi løta eitt givið høvið til at taka upp spurningin, *um vit skulu ella ikki skulu hava forskúla í Klaksvíkar kommunu* – og hetta er orsøkin til, at hetta mál verður tikið upp til viðgerðar nú.

Kanna møguleika fyri einum møguligum forskúla á Skúlatrød
Ætlanin við hesum tilmæli er at útvega heimild frá politisku skipanini til at kanna fyrimunir og vansar við at skipa ein forskúla á Skúlatrød, og um møguleiki er fyri hesum; og at kanna, hvussu eitt møguligt forskúlatilboð í Klaksvík eigur at verða skipað, námsfrøðiliga og verkliga, sambært kunngerð nr. 108 frá 8. august í 2013 um skipan og læring í forskúla, og soleiðis at tað hóskar saman við teimum tilboðum, sum longu eru í skúlanum og í dagstovnunum.

Spurningurin um forskúla er ikki viðgjørdur í Klaksvíkar kommunu áður, annað enn at hetta er nevnt sum ein møguleiki í 3. byggistigi í byggiskránni fyri Skúlatrød, tó at hetta ikki er viðgjørt nágreiniliga í byggiskránni.

Skipað tilgongd
Ætlanin er at hava eina so opna og fevnandi tilgongd sum gjørligt, har allir viðkomandi partar taka lut og verða hoyrdir.

Mælt verður til at fáa til vega vitan um forskúlatilboð og kanna fyrimunir og vansar, bygnaðarliga, praktiskt og námsfrøðiliga, við atliti at verandi dagstovnatilboðum, skiftinum millum dagstovn og skúla og skúlabyrjan.

Ætlanin er at hyggja at forskúlatilboðum aðrastaðni í landinum og fáa lut í teimum royndum, sum longu eru gjørdar, og at leita upp vitan og námsfrøðilig tilmæli um evnið. Og ætlanin er eisini at kanna hølisumstøður í skúlanum, hølisligar avleiðingar og møguleikar á dagstovnaøkinum og kostnað.

Arbeiðsbólkur
Biðið verður um heimild til at seta ein arbeiðsbólk at skipa fyri og fyrisita kanningar- og greiningararbeiðið við hesum umboðum:

1. *Eyðstein Ólason Poulsen*, formaður í Trivnaðarnevndini børn & ung, formaður í arbeiðsbólkinum

2. *Karl Haldorsson Johansen*, borgarstjóri
3. Eitt umboð fyri býráðsminnilutan
4. *John Færø*, trivnaðarstjóri
5. *Niels Juel Arge*, barnaansingarsamskipari
6. Umboð 1 fyri dagstovnaleiðarar (barnaansingarsamskiparin útnevnir)
7. Umboð 2 fyri dagstovnaleiðarar (barnaansingarsamskiparin útnevnir)
8. *Jórun Andreasen*, forkvinna og foreldraumboð í skúlastýrinum
9. *Vagn Foldbo*, skúlastjóri
10. Starvsfólkaumboð á Skúlatrøð (skúlastjórin útnevnir)
11. Eitt umboð fyri Námsfrøðiligu Ráðgevingina (NR)
12. Uttanhýsis ráðgevi við royndum frá økinum

*Umsitingin og nevndarformaðurin hava kannað, hvørjir uttanhýsis ráðgevar eru tøkir, sum hava royndir innan hetta økið, og eru vit komin eftir, at *Ingibjørg Berg*, fyrrverandi kommunustjóri og trivnaðarstjóri hjá Tórshavnar kommunu og fyrrverandi aðalskrivari í Kommunufelagnum, sum nú í nøkur ár hevur virkað sum uttanhýsis ráðgevi, hevur hollar royndir innan júst hetta økið frá tíð hennara sum stjóri hjá Tórshavnar kommunu, og verður mælt til at hava hana sum uttanhýsis ráðgeva og toghaldara hjá arbeiðsbólkinum og kommununi í sambandi við hesa tilgongdina.

Arbeiðssetningur og arbeiðs- og tíðarætlan
Biðið verður eisini um undirtøku fyri hesum arbeiðssetningi og tíðarætlan:

Arbeiðssetningur
Arbeiðsbólkurin skal

- kanna námsfrøðiligar og verkligar fyrimunir og vansar við forskúlatilboði á Skúlatrød við atliti at skiftinum millum dagstovn og skúla og skúlabyrjan
- í arbeiðinum hyggja at forskúlatilboðum aðrastaðni í landinum og fáa sær vitan um tær royndir, sum eru gjørdar í sambandi við, at forskúlatilboð vórðu skipað í øðrum kommunum
- leita sær upp vitan og námsfrøðilig tilmæli um evnið
- kanna hølisumstøður í skúlanum og meta um hølisligar avleiðingar og møguleikar á dagstovnaøkinum
- meta um kostnaðin av at skipa forskúlatilboð á Skúlatød – bæði viðvíkjandi íløgum og rakstri
- spyrja seg fyri hjá góðkennandi myndugleikum, um hvørji myndugleikakrøv kunnu væntast at koma afturat, um forskúli verður skipaður á Skúlatrød
- í arbeiðinum hoyra allar viðkomandi partar og á hóskandi hátt kunna allar viðkomandi partar um ta vitan, sum arbeiðsbólkurin fær í sambandi við greiningararbeiðið

Arbeiðs- og tíðarætlan
Um býráðið tekur undir við omanfyristandandi, verður mælt til niðanfyri standandi arbeiðs- og tíðarætlan:

1) Mars 2021:
    a. Hetta tilmælið verður lagt fyri nevndir og býráðið til viðgerð
    b. Býráðið tekur støðu til tilmælið, og um farast skal víðari eftir hesum tilmælta leisti
    c. Verður málið samtykt, útnevnir býráðið á sama fundi limirnar í tilmælta arbeiðsbólkinum
2) Apríl 2021:
    a. Arbeiðsbólkurin fer til verka at útinna tann av býráðnum samtykta arbeiðssetningin eftir samtyktu arbeiðs- og tíðarætlanini

b. Arbeiðsbólkurin fær knappar 3 mánaðir (apríl, mai og juni) til at gera sítt álagda arbeiði og at skriva sítt tilmæli at leggja fyri avvarðandi nevndir og býráðið
c. Sum formaður í arbeiðsbólkinum hevur trivnaðarnevndarformaðurin børn & ung yvirskipaðu leiðsluna av arbeiðnum og tilgongdini, meðan uttanhýsis ráðgevin verður ráðgevandi og útinnandi skrivari hjá bólkinum saman við trivnaðarstjóranum
d. Í tann mun, tað letur seg gera, kunnar arbeiðsbólkurin leypandi ta politisku skipanina

3) Juni 2021:
   a. Tilmælið frá arbeiðsbólkinum verður lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið
   b. Býráðið tekur prinsippiella støðu til spurningin um forskúla við atliti til 2. og 3. byggistig á Skúlatrød og víðari útbyggingar á dagstovnaøkinum

Lógargrundarlag:

Lógargrundarlag fyri forskúla
Heimildin at skipa forskúla er í fólkaskúlalógini, sum í § 4, stk. 4, ásetir, at kommunum kann verða loyvt at seta 1 árs forskúlaflokk/ar á stovn. Gjøllari reglur eru í kunngerð um skipan og læring í forskúla frá 2013. Sambært fólkaskúlalógini er tað kommunustýrið, sum ger uppskot til skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum (§47, stk. 6). Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum (§52, stk. 4). Landsstýrismaðurin góðkennir skúlabygnaðin.

Lógargrundarlag hjá arbeiðsbólkinum
Arbeiðsbólkurin hevur ikki heimild at taka avgerðir, men skal virka ráðgevandi og fyrireika tilmæli at leggja fyri avvarðandi nevndir og býráðið.
Arbeiðsbólkurin er ikki ein delegatión av myndugleikanum hjá kommunustýrinum men hevur til uppgávu at lýsa málið. Tá arbeiðsætlanin er rokkin, verður arbeiðsbólkurin avgildaður.
Ein slíkur arbeiðsbólkur er ein partur av kommunalu fyrisitingini og til tess krevst ikki ein serskild lógarheimild.

Fíggjarligar avleiðingar:
Kostnaðurin av at gera hetta kanningararbeiðið verður væntandi á leið hesin:

Útreiðsluslag	Útreiðsluútgreining	Væntaður kostn.	Rakstrarstað/standardkonta
Fundarsamsýning til arbeiðsbólkin	Væntandi ca. 8 fundir og 2 námsferðir	60.000 krónur	Fíggjast av játtanini til nevndar- og býráðssamsýningar
Ráðgeving, kanningar, hoyringar, samskifti, stýring av tilgongdini, frásagnir, upplegg v.m. – Ingibjørg Berg	Væntandi ca. 150 tímar	110.000 krónur	Fíggjast av rakstrarstaðnum "Barnaansing felags", standardkonta nr. 147901 "Sakkøn hjálp"
Aðrar útreiðslur	Ferðing, matur o.a.	10.000 krónur	Fíggjast av rakstrarstaðnum "Barnaansing felags" og avvarðandi standardkontum.
		180.000 krónur	

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt til, at býráðið – eftir tí í hesum tilmæli uppskotna leisti:

- gevur heimild til at kanna fyrimunir og vansar við at skipa ein forskúla á Skúlatrød, og um møguleiki er fyri hesum; og at kanna, hvussu eitt møguligt forskúlatilboð í Klaksvík eigur at verða skipað, námsfrøðiliga og verkliga, sambært kunngerð nr. 108 frá 8. august í 2013 um skipan og læring í forskúla, og soleiðis at tað hóskar saman við teimum tilboðum, sum longu eru í skúlanum og í dagstovnunum,
- tekur undir við tí í tilmælinum uppskotna arbeiðssetningi, arbeiðs- og tíðarætlan
- tekur undir við tí í tilmælinum uppskotna arbeiðsbólki og útnevnir limirnar í arbeiðsbólkinum, sum fær til uppgávu at skipa fyri og fyrisita sítt álagda kanningar- og greiningararbeiðið og at skriva sítt tilmæli at leggja fyri avvarðandi nevndir og býráðið í juni mánaði 2021.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 16. mars 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 09.03.2021.

Fíggjarnevndin 23. mars 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við B&U 16-03-2021.
JS og TJL taka støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá B&U 16-03-2021 og meirilutatilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt. Harumframt einmælt samtykt, at umboð býráðsminnilutans í arbeiðsbólkinum verður Signhild V. Johannesen.

43/21
20/01227-17 Vetrarhaldið í jan/feb 2021 - serlig avbjóðing – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	17.03.2021	23/21
2 Fíggjarnevndin	23.03.2021	32/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	43/21
4 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	

20/01227-17 Vetrarhaldið í jan/feb 2021 - serlig avbjóðing

Frágreiðing um málið:
Vetrarhaldið í jan/februar 2021 hevur verið ein serlig avbjóðing hjá kommununi, og av somu orsøk hevur Vegadeildin arbeitt við salting og kavarudding í fleiri vikur. Øll játtanin til *Kavarudding* í 2021 – 723 tkr. - er brúkt í hesum sambandi.

Kavin við frostveðri lá óvanliga leingi, og tí varð avgjørt at fremja eitt størri ruddingararbeiði, har nógvar gongubreytir eisini vórðu grivnar, og kavin fluttur burtur við lastbilum.

Ikki kann roknast við, at vetrarhaldið er yvirstaðið í ár, og tí verður helst neyðugt við størri játtan til salting og kavarudding.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Øll játtanin uppá 723 tkr. er brúkt, og tí er vandi fyri yvirtrekki. Um hugt verður eftir seinastu árunum, so kann tørvurin fyri meirjáttan lættliga gerast einar 200 tkr.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri TN og FíN til viðgerðar/støðutakan.

Tekniska Nevnd 17. mars 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-02-2021, og verður peningurin tikin av *tøkum peningi*.

Fíggjarnevndin 23. mars 2021:
Nevndin tekur undir við TN 17-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt.

44/21
21/00343-14 Frostbinding, eyka útreiðslur hjá Vatndeildini – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	17.03.2021	22/21
2 Fíggjarnevndin	23.03.2021	33/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	44/21
4 Klaksvíkar Býráð	29.04.2021	

21/00343-14 Frostbinding, eyka útreiðslur - Vatndeildin

Frágreiðing um málið:
Í januar og februar 2021 hevur Vatndeildin havt avbjóðingar av at veita drekkivatn til borgarar og virkir vegna frostbinding, og óvissan hevur kravt, at deildin hevur gjørt neyðug átøk fyri at tryggja vatnveitingina.

Skriv varð sent til virkini í Klaksvík um at nýta minst møguligt vatn næstu dagarnar, og mint varð á støðuna, sum kann taka seg upp, tá frostbinding vetrarhálvuna kann føra til, at vatnmangul verður í kommununi. Skrivið bleiv sent út í skundi, tí avlesarin hjá kommununi vísti, at byrgingin í Strandadali var næstan tóm. Nevnda byrging er at rokna sum rávatnsgoymsla hjá kommununi.

Frostbinding í fjøllunum førdi til, at drekkivatnið minkaði í stórum, og starvsfólk hjá Klaksvíkar kommunu høvdu ikki áður upplivað slíkar umstøður, og veðurforsøgnin segði frá frosti fleiri dagar fram. Kommunan kundi tí – við dagligu vatnnýtsluni - ikki veita trygd fyri, at nóg mikið av vatni bleiv tøkt.

Vatnútbyggingin í samband við smoltstøðina er seinkað, men tá støðan við drekkivatninum ikki batnaði, bleiv avgerð tikin um at framskunda sáttmálabundin vatnleiðingsarbeiðir, sum skulu føra til, at vatn kann veitast til vatnverk kommununnar frá Hjarðardali og Hellisdali á Kunoy.

Partur av nevnda íløguarbeiði verður goldin av Bakkafrost og partur av arbeiðinum *Vatnveiting Íløgur*. Bráðfeingis parturin verður goldin av *Vatnveiting rakstur*. Vatndeildin hevur uppgjørt hendan partin til 200 tkr.

Arbeiðið umfatar alt arbeiði, sum ikki er fevnt av sáttmálum, sum eru gjørdir við Kanjon, Norðhús og Blikksmiðjuna. Talan er um fyribils íbindingar og fyribils leiðing til vatnverkið við Ánagjógv.

Kommunan fekk á hendan hátt einar 70 rúmetrar av vatni um tíman úr Kunoy, og gjørdi hetta allan munin, soleiðis at virksemið hjá vinnu og borgarum kundi halda áfram ótarnað. Kommunan fekk eisini roynt skipanina (við vatni úr Kunoy) og hevur nú vissu fyri, at skipanin fer at virka.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
Kunngerð nr. 127 frá 22. november 2013 um veiting av drekkivatni, sum broytt við kunngerð nr. 103 frá 9. juli 2019

Fíggjarligar avleiðingar:
Peningaliga avsetingin hjá Vatndeildini er tepur, og hetta eisini vísandi til, at nú er vatntøkuøkið nógv vaksið, og vatnverkið er meira krevjandi. Longu nú verður tí mett, at eitt yvirtrekk verður sera trupult at umganga við ársenda. Roknast kann tí við einum yvirtrekki uppá einar 200 tkr. í 2021 á kontuni *Vatnveiting rakstur*.

Tilmæli:
Við hesum sendir tekniska fyrisiting málið til viðgerðar í TN, FíN og í Býráðið (2 ferðir) vísandi til, at roknast kann við yvirtrekki í 2021.
Vísandi til serligu umstøðurnar kann fyrisitingin viðmæla eina eykajáttan upp á 200 tkr. til *Vatnveiting rakstur*, sum verður at fíggja av *tøkum peningi*. Rakstrarsíðan á fíggjarætlanini fyri 2021 hækkar sambært hesum við 200 tkr.

Tekniska Nevnd 17. mars 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 02-03-2021.

Fíggjarnevndin 23. mars 2021:
Nevndin tekur undir við TN 17-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt.

45/21
21/00407-1 Umfígging og lántøka – mars 2021

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	23.03.2021	28/21
2 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	45/21

21/00407-1 Umfígging og lántøka – mars 2021

Frágreiðing um málið:
Víst verður til nærri frágreiðing frá umsitingini í skrivi 17. mars 2021.

Sum kunnugt eru 0 mió. kr. settar av á fíggjarætlanini til avdráttir, men av tí at árligi avdráttarprofilurin er góðar 9 mió. kr., verður neyðugt at umfíggja skuldina við nevndu upphædd. Nevnast skal eisini, at

kommunan seinastu árini hevur umfíggjað fyri at fáa broytingarnar í bankaskuldini at stemma við avsetingina í fíggjarætlanini. Í fjør var hetta gjørt í desember.

Heitt verður á fíggjarnevndina/býráð um at geva umsitingini heimild at upptaka lán upp á 9,1 mió. kr. – avrundað til 10 mió. kr. - til avdráttirnar í 2021. Vit kunnu rokna við, at rentan á láninum kemur at liggja millum 0,55 og 0,90%.

Møguliga skal lánið verða enn hægri. Um ikki, so kann roknast við, at líknandi mál verður reist í apríl ella mai.

Lógargrundarlag:
§ 43. Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum.

Fíggjarligar avleiðingar:
Av tí at kommunan einki hevur sett av til avdráttir er neyðugt at umfíggja skuldina við 9,1 mió. kr.

Tilmæli:
Mælt verður til at geva umsitingini heimild at upptaka lán upp á 10 mió. kr. til at dekka avdráttirnar, sum fella til gjaldingar í árinum.

Fíggjarnevndin 23. mars 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 17-03-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá FíN 23-03-2021 einmælt samtykt.

46/21
14/00763-51 Liðugtgerð av vælveruøki í Klaksvíkar Svimjihøll – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	16.02.2021	10/21
2 Fíggjarnevndin	23.02.2021	12/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	21/21
4 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	46/21

14/00763-51 Liðugtgerð av vælveruøki í Klaksvíkar Svimjihøll

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 25. februar 2021.

Mentanarnevndin 16. februar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-02-2021.

Fíggjarnevndin 23. februar 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 16-02-202.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Tilmælið frá FíN 23. feb. 2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá BýR 25-02-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

47/21
18/00229-56 Jústabrekka 1 leigast út til AV, meirkostnaður umvæling – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	15.02.2021	27/21
2 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	16.02.2021	8/21
3 Tekniska Nevnd	17.02.2021	15/21
4 Fíggjarnevndin	23.02.2021	19/21
5 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	23/21
6 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	47/21

18/00229-56 Jústabrekka 1 leigast út til AV - meirkostnaður umvæling

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 25. februar 2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. februar 2021:
Nevndin staðfestir meirkostnaðin á kr. 435.000 og tekur undir við eini víðkan av lániheimildini.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 16. februar 2021:
Nevndin tekur undir við UBN dagf. 15-02-2021

Tekniska Nevnd 17. februar 2021:
Nevndin tekur undir við E&B 16-02-2021.

Fíggjarnevndin 23. februar 2021:
Nevndin tekur undir við TN 17-02-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Tilmælið frá FíN 23. feb. 2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 25. mars 2021:
Tilmælið frá BýR 25-02-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.